Sankta Frans skúli

Trivnaðarætlan

2015

Inngangur

Í dagsins samfelag er neyðugt at vísa umsorgan og fyrilit. Fyri at menna eitt gott og trygt umhvørvi fyri næmingar, starvsfólk og foreldur, er neyðugt at seta sær greið mál, hvat vit vænta av hvørjum øðrum. Soleiðis skapa vit eitt gott umhvørvi, har *vit trívast og **happing** mistrívist!*

Tá vit nýta orðið næmingur, er talan um næmingin í skúlatíðini.

Úr fólkaskúlalógini grein 1 stendur:

Stk. 3. Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. **Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.**

Í skúlanum knýta vit vinabond, men vinabond kunnu eins væl verða slitin, um arging, happing og illstøður eru gerandiskostur ella ikki verða tikin upp og steðga við tað sama! Tá skúlaskyldan er 9 ár, er tað lætt at hugsa sær, hvussu ein næmingur hevur tað, sum upplivir ágang, sum eingin tekur sær av. Hann fer aftur fakliga, hevur ilt við at hugsavna seg og sjálvvirðið minkar.

Her á skúlanum arbeiða vit miðvíst fyri góðum trivnaði fyri allar partar. Henda ætlan skal verða ein hjálp til tess at tryggja trivnaðin í dagliga arbeiðinum og fyribyrgja mistrivna.

Skal hetta eydnast, er neyðugt, at allar góðar kreftir samvirka. Trivnaðurin heima hevur eins stóran týdning og trivnaður í skúlanum og samfelagnum sum heild.

Saman standa vit sterk !

Virðisgrundarlagið

Virðisgrundarlagið byggir á 4 súlur : fakligan førleika, tryggleika, samstarv og virðing

Fakligur førleiki

av tí at:

dugnalig fólk eru týdningarmikil í dagsins samfelag
øll børn hava rætt til og brúk fyri fakligum krøvum, hóskandi til teirra evni og áhuga
fakligur førleiki skapar gleði og økir sjálvvirðið.

Tryggleiki

av tí at:

bæði børn og vaksin virka best í tryggum og jaligum umhvørvi
tað er týdningarmikið at tora at ganga nýggjar leiðir, menna síni evni og tora at stíga fram
tað er neyðugt til tess at nema sær lærdóm og mennast sosialt

Samstarv

av tí at:

tað er týdningarmikið at hava álit á og at gera brúk av tí, hvør einstakur er góður til,
at samstarv er neyðugt í øllum arbeiði í skúla, flokki og øðrum bólkum, vit eru partur av.
Í dag er neyðugt at vísa tolsemi og kunna virka í ymsum høpi,bæði fakliga, sosialt eins væl og í altjóða høpi

Virðing

av tí at:

øll eru ymisk og hava ymiskan tørv
tað er neyðugt at læra børn at hava virðing fyri felags virðum og sjónarmiðum
øll mugu virða skapanarverkið og tað skapta

Trivnaður

Fyri at læra mugu vit trívast. Skúlin hevur eitt **virkið** tilbúgvingartoymi, har leiðslan er umboðað saman við lærarum, AKT, SSP og skúlasjúkrasystir.

Skúlin skal

- vera eitt gott stað at vera í hvørjum einstakum næmingi.
- øll skulu vera við í felagsskapinum
- vit skulu hava eitt læruumhvørvi, sum er merkt av skipaðum og friðarligum samskifti.

Næmingarnir skulu

- føla samábyrgd av einum jaligum og góðum skúlaumhvørvi
- menna sjálvsálitið
- vísa virðing, umsorgan og fyrilit fyri øðrum
- taka ábyrgd av egnum gerðum
- tora at koma við egnum meiningum og læra at lurta eftir hvørjum øðrum
- tryggir ogna sær vitan og førleikar, sum eru neyðugir til víðari læring

Lærarin skal

- møta til tíðina og vera væl fyrireikaður
- hava hollan kunnleika at undirvísa
- møta børnunum á tí støði tey eru og haðani eggja teimum at læra
- vera fólksligur og tosa hampiliga við næmingar og felagar
- arbeiða við trivnaðinum í flokkinum
- skapa gott samarbeiði millum heim og skúla

Flokslærarin skal

- hava høvuðsábyrgdina av flokkinum, í tøttum samstarvi við læraratoymið
- fylgja flokkinum fleiri skúlaár
- fylgja við trivnaðinum hjá tí einstaka barninum
- regluliga arbeiða við vinalagnum í flokkinum
- floksfundir eina ferð um vikuna, har rós verður givið fyri rættari atferð (umleið 20 min. + okkurt spæl uttan kapping)
- hava næmingasamrøður (umleið 20 min./barn) 2 ferðir árliga, og foreldrini skulu kunnast
- læra næmingarnar at siga frá upplivingum og kenslum
- læra næmingarnar, at eingin skal taka lut í ella góðtaka, at næmingar verða argaðir út úr
- hava gott samstarv við aðrar lærarar hjá flokkinum
- hava gott samstarv við foreldrini
- eggja næmingunum at vitja floksfelagar í frítíðini
- skipa fyri felags upplivingum, so bókliga veikir næmingar kunnu vísa, at teir handaliga ella
- sosialt eru góðir fyri flokkin og verða virdir av floksfeløgunum

Felags upplivingar kunnu t.d. vera:

- útferðir
- seturskúlar
- hugnakvøld
- evnisdagar
- sjónleikir
- framførslur
- undirvísingin

Flokkurin skal

- fríðka um flokshølið saman við læraranum, so tað verður hugnaligt
- saman við læraranum gera fastar mannagongdir fyri atburði (ikki forboð t.d. ”Ikki er loyvt…”, men heldur ”Øll skulu sleppa …”)
- flytast, so at allir næmingar hava sitið saman við øllum í flokkinum, tá skúlaárið er farið
- syrgja fyri, at øll royna at arbeiða saman við øllum, tá vit hava felagsarbeiði og bólkarbeiði

Foreldrasamstarv

Foreldrini skulu kunnast um, at um góður trivnaður skal vera í skúlanum, so er neyðugt, at næmingarnir:

- møta rættstundis
- hava etið morgunmat og eru væl svøvntir
- eru væl fyri, tá ið teir koma í skúla
- eru væl fyrireikaðir
- eru reinir
- hava góðan ordan í skúlataskuni
- hava matpakka við, tá teir eru í skúla í matarsteðginum
- eru fólkaligir og tosa hampiliga
- góðtaka teirra floksfelagar
- ikki órógva í skúlastovuni ella í skúlanum sum heild

Foreldrini skulu siga skúlanum frá, um serlig viðurskifti eru galdandi hjá einum barni (t.d. sjúka osv.), ella um barnið ikki trívist í skúlanum. Tað er gott, at foreldur møtast fyri at tosa um flokkin.

Upplýsing millum skúla og heim er alneyðug. Á hvørjum ári fær heimið eitt blað, har allar ætlanir fyri skúlaárið eru lýstar og dagførdar. Hetta blað verður kallað Ársrit. Harumframt geva lærarar heiminum viðkomandi kunning.

Atferðartrupulleikar

Gott læruumhvørvi er væl skipað og fólk trívast. Uppgávurnar hjá leiðslu, flokslærara, toymi, lærarum floksins, garðvakt og starvsfólki annars verður skipað.

Fyri at fara rætt fram, mugu vit greina orsøkina til atferðartrupulleikan:

1. Um brek er orsøk til atferðartrupulleikan
   - greina brekið, diagnostisera (so vit kunnu fara fram hareftir)
   - tímar fylgja vónandi við

2. Um kreppa er orsøk til trupulleikan:
   - slag av kreppu (hví og hvussu sár)
   - tilbúgvingarætlan til sorg (deyða, sjúku, hjúnarskilna)

3. Um orsøkin er, at tey bera seg illa at:
   - sosialir og kensluligir trupulleikar
   - tillagingar – trupulleikar
   - útfarandi/innatvend

Viðvíkjandi pkt. 3 er at siga, at her mugu serstakar mannagongdir til. Fyrst má greiða fáast á, hvør/hvar trupulleikin er:
   - í fríkorteri
   - í tíma (hjá einum/ fleiri lærarum)
   - eftir skúlatíð
   - arbeiðslag/uppmøting/heimaarbeiði

Fríkorter: Garðvaktin roynir at loysa trupulleikan. Ber tað ikki til, fer hon til flokslæraran. Fær hann heldur ikki loyst trupulleikan, fer hann til leiðsluna.

Í tíma: Lærarin roynir sjálvur at loysa trupulleikan. Ber tað ikki til, verður tað tikið upp í toyminum. Er tað átrokandi at fáa loyst, kann lærarin tosa við leiðsluna.

Eftir skúlatíð: Er trupulleikin soleiðis, at hann ávirkar skúladagin, mugu vit taka tað upp.

Arbeiðslag v.m.: Tilbúgving hesum viðvíkjandi.

Skúla/heim samstarv: Tann sum roynir at loysa ein trupulleika, má samstundis gera av, um heimið skal kunnast. Er heimið kunnað **3 ferðir** (uttan at leiðslan er blandað uppí), verður málið latið leiðsluni at loysa.

Góð ráð: Mælt verður til, at *lærari ikki er einsamallur,* tá ein næmingur verður "hartaður". Hetta fyri at tryggja næminginum og læraranum virðiliga viðferð.

Alt skal skjalprógvast fyri at vísa, hvat hevur verið gjørt. Fundarboð til foreldur verða send skrivliga, og aftaná fundin verður fundarfrásøgn skrivað. Flokslærari + 1 lærari eru við til fundin. Í serligum føri kann leiðslan taka lut.

Sí annars brotið: "Virðing fyri øllum".

Happing

Hvat er happing?

Happing er, tá ein persónur fleiri ferðir í longri tíð er fyri negativum gerðum frá einum ella fleiri persónum. Eingin javnvág er millum tann happaða og happaran. Tann happaði hevur ilt við at verja seg og mestsum hjálparleysur.

Tekin hjá barni, sum er happað og plágað

- kemur heim við skrøddum klæðum og illa farnum bókum
- kemur heim við merkjum ella prusi og veit ikki at siga hví
- kemur sjáldan ella ongantíð heim við floksfeløgum ella javnaldrum
- sjáldan saman við javnaldrum ella øðrum børnum

- sjáldan við til tiltøk saman við øðrum børnum
- tykist bangið fyri at fara í skúla ella vil ikki í skúla
- hevur mangan høvuðpínu, búkpínu, ringan matarlyst – helst á morgni
- barnið velur sær umvegir í og úr skúla
- barnið hevur marruna og svevur illa
- tað tykist ólukkuligt og hugtungt
- tað hevur skiftandi huglag – skiftir frá øði til ovurgleði
- tað stjelur ella meykar um eyka pengar

Vit góðtaka ikki happing

- happing er ikki ein ósemja, sum børnini skulu loysa
- happing er ikki ein ósemja, men ágangur
- vit kunnu/skulu steðga happing
- børn, sum trívast, læra skjótari

Hvør verður happaður?

- Útsjóndin hevur einki at siga, um ein verður happaður ella ikki. Tó verða fysiskt veikir dreingir oftari **happaðir**. Tey happaðu kenna seg/fara at kenna seg t.d. ósikkur, bangin, ótrygg og hava/fara at hava lítið sjálvsálit. Er tann happaði ikki í skúla, verður eitt nýtt offur funnið.

Happarin

- er ikki bangin og ósikkur
- er ofta fysiskt sterkur og aggressivur
- hevur trupult við at ímynda sær kenslurnar hjá øðrum
- hevur lítla samkenslu
- vantar umsorgan og kærleika í barnaárunum
- hevur ov fáar rammur og *ov* stórt frælsi

Hjálparmenn hjá happaranum

- Ofta tora børn ikki at siga frá um happing, tí tey eru bangin fyri sjálvi at verða úti fyri tí sama. Hesi børn føla við teimum happaðu, hóast tey sjálvi happ. Tey tigandi í flokkinum skulu læra at siga frá, tá onkur verður happaður.

Soleiðis steðga vit happing

- Lærarin hevur høvuðsábyrgdina av, at allir næmingar í flokkinum trívast. Um lærari ikki steðgar happingini, missa næmingarnir virðingina fyri læraranum, og hann missir tamarhaldið á flokkinum. Happing byrjar ofta við, at næmingar arga eitt offur.

- Á skúlanum hava vit lærarar, ið skynsamt kunnu ráðgeva og hjálpa við at koma trupulleikanum til lívs. Flokslærari kann seta seg í samband við AKT-umboðið á skúlanum.

- A stendur fyri atferð, K fyri kontakt og T stendur fyri trivnaði.

- Næmingasamrøður (sí fylgiskjal 1) verða gjørdar soleiðis, at happingin kann steðgast. Áðrenn fari verður í gongd er umráðandi, at leiðslan er væl kunnað, og at hon stuðlar arbeiðsgongdini. Næmingasamrøðan gevur læraranum møguleika at fáa eyga á trupulleikar, sum seinni kunnu útvikla seg til happing, um einki verður gjørt við tað.

- **Lær barnið at siga frá sínum kenslum**
- **Sig barninum, at tey vaksnu (lærarar) vilja hjálpa**

Ein vika verður sett av til tiltakið

Mánadag, týsdag og mikudag næmingasamrøður (umleið 20 min./barn). Foreldrini geva loyvi.

1: Vit kanna um happing fer fram í flokkinum

Næmingasamrøður:

Høliø skal vera hugnaligt og friðarligt.
Vit tosa fyrst við barnið, sum bestemmar minst. So við barnið, sum bestemmar næstminst osv. Vit tosa seinast við barnið, sum happar.
Samtaluevnini eru tey, sum verða lýst í fylgiskjali 1.
Álagt verður næmingunum ikki at tosa um samrøðuna við onnur.

2: Um funnið verður út av, at happing er í flokkinum, skal hon ***steðgast.*** Samrøða verður gjørd við happaran. Tað skal ikki vera ov nógv tos. Óneyðugt er, at happarin sigur sína meining. Lærarin sigur: ”*Vit vita, at henda hendingin hevur verið … og hetta skal steðga nú”.*

3: Hjálpir samrøðan ikki, verður leiðsla saman við øðrum lærarum í flokkinum og foreldrum hjá happaranum kunnaði.

4: Vit hava næmingasamrøður (við tann happaða, happaran og við happarar), floksfund og foreldrafund hósdag.

1: Samrøða við happaða (umleið 20 min.)
2: Samrøða við happaran
3: Samrøða við hjálparar (við happarar) umleið 5 min. Bert *ein* í senn

Floksfundur (umleið 20 – 30 min.)

1: Lærarin er orðstýrari og ger av, hvar hvør skal sita
2: Næmingarnir skulu tosa beinleiðis. T.d.: ”*Rasmus, eg verði kedd, tá tú rópar meg* ”Nørd”. Kanst tú gevast við tí?” So svarar Rasmus: ”*Ja, eg skal gevast”*
3: Bólkarbeiði: Hvat er ein góður vinur ? (umleið 30 min.)
4: Felags samtala um evnið (umleið 15 min.)

Foreldrafundur

”Frá happing til gott vinalag” er yvirskriftin.

Foreldrini fáa at vita, at happing hevur verið í flokkinum, og hvat arbeiði hevur verið gjørt fyri at steðga happingini. Síðani verður ikki meira tosað um tað, sum hevur verið. Eingi nøvn verða nevnd, men tosað verður um, hvussu vit kunnu styrkja tað góða í flokkinum.

Fríggjadagur: Aftur floksfundur

Eftirmeting

Flokslærarin eftirmetir saman við toyminum fleiri ferðir, um allir partar eru nøgdir við atburðin hjá truplu næmingum.

Onkur næmingur klárar ikki at hava góðan atburð og má tí hava ein vaksnan hjá sær í fríkorterinum og tímunum, til viðkomandi hevur lært rættan atburð.

Happarin kann flytast í annan skúla.

Eisini kann skúlin fáa hjálp frá heilsusystir, sálarlækna, Sernámsdeplinum v.m.

Tá ið lærari/starvsfólk verður fyri harðskapi

Til tín, ið hevur verið fyri harðskapi, hóttanum ella skelki

- ***Tað er verri, enn tú heldur***

Tú hevur verið fyri eini skelkandi hending. Ein hending, ið hevur ávirkað teg serstakliga nógv. Meira enn tú nakrantíð hevur droymt um.

Tú kennir teg nærmast sundursoraðan. Tú ert í kreppu, og tað tekur tíð at koma fyri seg aftur. Í dag kenna vit nógv til teir tankar og tær kenslur, ið bilgjast í einum, ið hevur verið úti fyri tí sama sum tú.

- Tak teg sjálvan og bakkastið í álvara
- Viðurkenn tað, ið er hent. Tað var ikki tín skyld, og tú kundi ikki havt forðað tí. Harðskapur kann raka øll. Tað er skrøgg, um tú heldur, at ávís fólk eru meira útsett fyri harðskapi enn onnur. Hetta er í roynd og veru hent orsakað av umstøðunum á arbeiðsplássinum, og bæði leiðsla og trygdarumboð skal inn í málið.
- Tú skalt ikki ræðast tínar kenslur og tankar. Tað er natúrligt í hesari støðu. Sig frá, hvussu tú hevur tað og greið frá hendingini. Ikki avbyrgja teg.
- Lat tínar starvsfelagar, vinfólk og nærmastu stuðla tær. Tú hevur brúk fyri umsorgan og onkrum, ið gevur tær ans. Ver alla tíðina saman við onkrum fyrsta samdøgrið, tí tað hevur tú best av.
- Bið ikki um at vera sjúkraskrivaður uttan so, at tú hevur fingið kropsligan skaða. Tað er freistandi at goyma seg burtur og royna at koma fyri seg aftur, men torførari verður at koma til arbeiðis aftur.
- Tú hevur rætt til serkøna hjálp. Tú ert ikki sjúkur, men í kreppu. Serkøn fólk kunnu hjálpa tær at skilja og góðtaka støðuna, tú ert komin í og hjálpa tær at fóta tær aftur. Tú fært eisini hjálp til at skilja møgulig afturstig.

Tú kanst hjálpa starvsfelaga tínum

Til tín, hvørs starvsfelagi hevur verið fyri harðskapi, hóttanum ella skelki

Starvsfelagi tín hevur verið fyri eini skelkandi hending og hevur tí brúk fyri tínari hjálp og stuðli. Royndir vísa, at atburður okkara í tílíkum førum hevur stóra ávirkan á, hvussu skjótt og væl ein starvsfelagi fótar sær aftur.

- Skil og góðtak støðuna. Tað er ymiskt, hvussu vit bera okkum at í slíkum førum, og vit eru ikki altíð skynsom.
- Góðtak tær støður, ið koma kunnu. Royn ikki at fáa viðkomandi at gloyma tað, ið hent er, men ver hjálpsamur. Hjálp starvsfelaganum at tosa um kenslur, ótta, skuldarkenslu og pínu.
- Góðtak tær kenslur, starvsfelagin hevur, og lat vera við at halda, at hetta hevur einki upp á seg. Sig ikki, at starvsfelagin bert skal taka seg saman. Neyðugt er, at hann verður tikin í álvara.
- Sig honum, at tað er heilt vanligt, at ein er nakað uppøstur í tílíkum støðum. Ein kennir seg raktan heilt inn at sálini, og tað kann viðføra ógvusligan og ræðandi atburð.

- Lat vera við at noyða hann at greiða frá hendingini. Lurta heldur – hóast tað er tað sama, ið sagt verður aftur og aftur.
- Tað er ikki neyðugt, at tú tekur synd í starvsfelaganum, men heldur at tú skilir hann, hevur umsorgan fyri honum, og at tú sýnir honum góðsku.
- Ver hjálpsamur við uppgávum, ið kunnu tykjast torførar at fáa greiðu á. Tað kann vera hjálp at ansa børnum, fara til handils o.a.
- Vissa teg um, at tey nærmastu vita um støðuna og um møguligt afturstig.
- Gev tær far um, at afturstig kunnu eisini koma langa tíð eftir, at hendingin fór fram.

Tá starvsfelagi kennir seg hóttan av starvsfelaga ella foreldrum

- Leiðslan verður kunnað
- Hendir hetta eftir arbeiðstíð, verður leiðslan kunnað sum skjótast
- Tann hótti fer skjótast til ber á fund við leiðsluna
- Hendir hetta í skúlatíð, tekur annar starvsfelagi sær av næmingunum
- Tann hótti má ikki fara til hús fyrr enn staðfest er, um tað er ráðiligt
- Leiðslan fylgir við, hvussu tann hótti, sum frálíður hevur tað.
- Tá tað kemur til foreldrafundir og fundir millum ónøgd foreldur ella lærarar, skulu altíð fleiri vera til staðar. Hetta er fyri at tryggja sær, at samskiftið er virðiligt.
- Tað er altíð eitt gott hugskot at bjóða foreldrum í skúlan til fundar heldur enn at samskifta umvegis telefon.

Tá eitt starvsfólk hóttir ein næming

- Tann, ið varnast, at eitt starvsfólk hóttir næming, tosar straks við næming og lærara.
- Er talan um harðskap móti næmingi, fær leiðslan straks boð um tað
- Foreldrini fáa altíð boð frá leiðslu skúlans
- Tey, ið eru uppi í hesum máli, halda seinni fund. Har verður støðan greinað við atliti til semju í málinum, ella um annað skal til.

Tá leiðslan verður hótt

Er talan um hóttan ella harðskap móti leiðslu skúlans, er hetta sera álvarsamt. Leiðsla skúlans kann illa fremja gott skil og arbeiðsnáðir í einum skúla, um hon sjálv er undir hóttan ella av harðskapi er illa fyri.

Tá kann talan vera um, at hetta er eitt mál fyri løgregluna, í mun til, at lærarar ella onnur verða hótt.

- Uttan mun til, hvør er
- fyri hóttan, harðskapi ella
- aðrari ógvusligari
- hending, eru góðu ráðini
- galdandi, sum eru nevnd
- í brotinum: ”*Tá ið*
- *lærari/starvsfólk verður*
- *fyri harðskapi.”*

Skúlabyrjan

Tá vit vita, hvørjir næmingar koma at ganga í *Sankta Frans skúla*, verður bræv sent heim, har

- bjóðað verður til foreldrafund/- viðtalu við fastari skrá
- faldari við reglum skúlans verður viðgjørdur
- lærarar floksins taka lut

Fasta skráin:

- hvørji eru vit / tit
- skúlin – tímatalvan – tilfarið
- næmingurin / serlig atlit?
- ábyrgd skúlans
- ábyrgd foreldra
- skúlareglur

Seinni (mai/juni) foreldra/barn dagur. Lærarar skipa fyri